

Tartan Army á Vaglinum í fjør (mynd: Óla Hans Olsen)

# Nakrar góðar um The **Tartan Army**

**Fýra ferðir hava skotsku fótbóltsfjepparnir málað Havnar bý bláan**

**Fólk smílast** og fegnast hvørja ferð føroyska fótbóltslandsliðið kemur í undankappingar-bólk saman við Skotlandi, tí tá kemur lív í býin, sum ongantíð áður. Tí viðhaldsmenninir – The Tartan Army – mála Havnar bý bláan við sínum veitslukenda dámi og stuttliga atburði. Onkrar góðar eru frá teimum ferðunum skotar hava verið her í fótbóltsørindum. Fyrstu ferð The Tartan Army vitjaðu her í 1995 sigur ein føroyingur við nakrar skotskar fótbóltsfjepparar: "Good luck with the match tomorrow". Tann eini skotin svarar beinanvegin: "Thanks, but we don´t need that!". Tá Føroyar fingu fyrra javnleikin ímóti Skotlandi í 1999 boðaði ein skoti frá: "In Scotland we always support two teams – Scotland and the team which plays England".(Í Skotlandi stuðla vit altíð tveimum liðum – Skotlandi, og so liðnum sum spælir ímóti Onglandi). Tá Føroyar fingu seinna javnleikin í 2002 helt ein annar skoti fyri: "Well if the Faroese defense is as thin as the Faroese beer, we´ll beat ya five-nil" (Um tann føroyska verjan er líka tunn, sum føroyska ølið. Ja so vinna vit 5-0).

### Sjálvspeiið

The Tartan Army eru sum skotar flestir, teir kunnu verða sjálvspeiskir. Eftir 2-2 javnleikin kundu fólk hoyra mangan skotskan viðhaldsmannin gremja seg yvirfyri vertunum á BBC Scotland. Men so knapp-liga ringir ein maður inn sum eitur Gordon: "Well I´m deva-stated that we can´t beat the worst team in the World" (Eg eri ógvuliga harmur um, at vit ikki klára at vinna á tí ringasta liðnum í Heiminum). Studiovertirnir eru skjótir til at verja Føroyar: "Oh no Gordon, The Faroe Islands have improved. They are not that bad." (Føroyar hava betrað seg. Liðið er ikki so ringt). Gordon er skjótur at svara studiovertunum: "Gentlemen you got me totally wrong! I support The Faroe Islands, and I´m devastated that we can´t beat Scotland" (Tit fara skeivir góðu menn. Eg haldi við Føroyum, og eg harmist um, at vit ikki klára at vinna á Skotlandi). Láturin hjá báðum útvarpsmonnunum mundi ongan enda fingið. Vit vóna øll, at Skotland og Føroyar verða í bólki saman næstu ferð. Og hvør veit, møguliga kemur ein stórur partur av The Tartan Army við Norrønu næstu ferð?



## Lætt at koyra

**Ferðirnar hjá Smyril Line** í Skotlandi byggja fyrst og fremst á, at fólk taka bilin við sær og so ræður um at minnast til, at skotar koyra í vinstru síðu.

- Tað er eingin trupulleiki at koyra í Skotlandi, hóast tey koyra í vinstru síðu. Fólk, sum ferðast har, eru púra samd um, at tað tekur stutta tíð at venja seg við at koyra í "skeivari" síðu. Ferðslan har norðuri í Skotlandi er ikki so nógv, vegirnir eru góðir at koyra á, og skeltingin er sera góð. Fólk eru eisini sera hjálpsom í ferðsluni.

## Ullapool



Ullapool er ein vakur, lítil býur á skotsku vesturstrondini

**Á skotsku vesturstrondini** liggur býurin Ullapool, sum hóast hann er lítil, er tað størsta bústaðið í sínum øki. Sløk 1500 fólk búgva í Ullapool, sum er ein sera vakur býur. Úr Ullapool ber til at fara við ferju til eitt nú Stornoway og Isle of Lewis. Í Ullapool eru eisini eitt fornminnissavn, listasavn, svimjihylur og sjálvandi nógvar pubbir. Nógvur tónleikur verður eisini spældur í Ullapool, og býurin hevur eisini sína egnu útvarpsrás.

## Gott veður



**Summi fólk halda**, at veðrið í Skotlandi er ikki veruligt summarveður, men summarveðrið í Skotlandi er stak gott. Hitin liggur um tey 20 stigini, og onkuntíð verður tað nakað heitari. Tað kann koma okkurt ælið, men tað er eingin stórur trupulleiki fyri summarið.

– Tað eru nógvir møguleikar at verða úti í frískari luft. Tað ber til at súkkla, ganga túrar, fara í fjøllini og verða á sjónum. Nýggj løggáva í Skotlandi hevur havt við sær, at ferðafólk kunnu fara júst har, tey hava hug at fara, bara tey skikka sær væl. Nógva staðni eru gøtur at ganga eftir, og tær gera tað lættari hjá ferðafólkum at uppliva náttúruna.